## Pól settur sum fíggjarleiðari

**Vágur:** Vágs kommuna hevur sett 34 ára gamla vágbingin Pól Thorsteinsson í starv sum fíggjarleiðara. Pól hevur áður starvast hjá grannskoðaravirkinum Rasmussen og Weihe í umleið átta ár, har ið hann m.a. hevur grannskoðað roknskapin hjá Vágs kommunu hesa tíðina. Hann hevur eisini starvast sum fíggjarleiðari hjá ALS og eftir hetta hevur hann so starvast sum logistikleiðari fyri heilsøluna P/F Poul Hansen, har hann starvast í løtuni. Pól Thorsteinsson fer úr núverandi starvi sínum hjá P/F Poul Hansen um miðjan apríl og flytur síðani suður til nýggja starvið sum fíggjarleiðari hjá Vágs kommunu.



## Brimskaði fyri 2 mió

Skopun: Ógvusligi brimskaðin herfyri gjørdi rættiliga stóran skaða á Lívfiskastøðina, men gjørdi eisini sera stóran skaða á sjálvt grótkastið. Mett verður, at tað kemur at kosta einar 2 milliónir at umvæla skaðan, skrivar bkv.fo. Skopunar Havn er landshavn, og her kemur Landsverk inn í myndina, tá teir fara at kanna skaðan.

# Vit hava eingi krøv



*- Vit ynskja at samstarva við Klaksvík, men fólkið má fyrst spyrjast, sigur Magni Garðalíð, borgarstjóri á Húsum*

**Ætlan er at fáa betri samstarv í lag millum Klaksvíkar kommunu við sínum 4.800 íbúgvum og Húsa kommunu við sínum 60 íbúgvum. – Vit ynskja at finna ein leist fyri, hvussu samstarvið kann økjast enn meiri í framtíðini, sigur Magni Garðalíð, borgarstjóri á Húsum.**

SAMSTARV
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Høgni Thomsen*

**Húsar:** - Nei, vit ætla ikki at krevja nakað, men vit fara kortini at koma fram við nøkrum ynskjum til hetta samstarvið, sigur borgarstjórin.

Nú alt meiri og meiri verður lagt út á kommunurnar at umsita, hevur tað ført til at fleiri kommunur sjálvbodnar hava lagt og fara at leggja saman.

Í Norðoyggjum er ein longu farin undir hetta, og í næstum verða eisini tikin stig á hesi leiðini.

Hjá kalsoyingum er støðan hon, at helvtin av oynni er í Klaksvíkar kommunu og hin helvtin ikki. Oyggin er í roynd og veru í tveimum og sundurbýtt millum tvær ólíkar kommunur.

- Best hevði verið um allar fýra bygdirnar stóðu saman sum ein eind, slær hann fast.

Teir hava verið á einum fundi við Klaksvíkar kommunu, meðan tað hevur gingið heldur striltið at fáa tann næsta fundin í lag.

- Vónandi kann hann verða skjótt, sigur Magni Garðalíð við Sosialin.

### Standa sterkari

Arbeitt hevur verið í eina tíð við at fyrireika eina samanlegging millum kommunurnar báðar.

Í løtuni er støðan hon, at Kalsoyggin er býtt í tveir partar: Mikladalur og Trøllanes eru longu partur av Klaksvíkar kommunu, men enn vantar ein samanlegging fyri tær báðar sunnastu bygdirnar á Kalsoynni – Húsar og Syðradal.

Hetta stigið er tikið í royndunum hjá teimum smærru kommunum í Norðoyggjum at koma uppí eina størri eind, soleiðis at tær betri kunnu standa seg, nú alt fleiri uppgávur verða lagdar út á kommunurnar at umsita.

Í Norðoyggjum er partur av Kalsoynni longu við í Klaksvíkar kommunu, eins og Svínoyggin kemur eftir næsta kommunuval. Tosað verður eisini við aðrar kommunur í økinum, og hava onkrir fundir verið.

Í smærru bygdunum er skipaðar lokalar nevndir, sum kunnu taka upp mál til viðgerðar ella umrøðu, ið snúgva seg um hetta staðið.

### Leggja stríðsøksina

Hugskotið aftanfyri ynskið um, at Kalsoyggin fer uppí Klaksvík øll sum hon er, er at skipa soleiðis fyri, at kalsoyingar í felag kunnu fáa størri gjøgnumslag fyri teimum lokalu ynskjunum.

Men hinvegin so má ein eisini kunna tosa saman,